Skúlafótbóltur

Finaludagur í Marghøllini í Vági

hósdagin 2. mai 2019

Góðu næmingar og foreldur

Nú nærkast stóri finaludagurin í Skúlafótbólti, og vit gleða okkum ógemeina nógv at fara suður í Marghøllina í Vági at spæla ímóti øllum hinum finaluliðunum.

Til samans fara eini 600 børn og ung úr øllum landinum at kappast um steyp og medaljur í fyrstu skúlafótbóltskappingini yvirhøvur, og íroknað floksfelagar, lærarar, foreldur og onnur áhugað verða væntandi útvið túsund fólk í Marghøllini til finaludagin.

Vit í skúlanum við Løgmannabreyt fara mannsterk suður við Smyrli hósmorgunin 2. mai, tí vit hava spælt okkum í heili 16 finalur. Tað merkir, at vit verða umleið 120 næmingar umframt lærarar og foreldur, ið fara suður at spæla, heppa, stuðla og eggja okkara liðum.

Smyril siglir av Havnini kl. 8.45 beinleiðis á Vág, men vit ætla okkum at vera tíðliga umborð fyri at fáa sitipláss, tí nógvir skúlanæmingar norðanfjørðs skulu suður at spæla.

Tí skulu øll vera á Farstøðini í seinasta lagi kl. 8.15

40 dystir skulu avgreiðast. Byrjað verður kl. 12.30, og leikskráin sigur, at teir yngstu flokkarnir spæla fyrst. Spælt verður út í eitt til umleið kl. 16, tá næmingarnir í 10. fl. og miðnámsskúlunum eru lidnir.

Matur:

"Uden mad og drikke, duer helten ikke" er eitt gamalt orðafelli. Av tí, at dagurin verður heldur drúgvur, vilja vit mæla til, at øll hava etið ein góða morgunmat, áðrenn farið verður umborð á Smyril. Vit fara eisini inniliga at heita á tykkum um at **hava tveir stórar matpakkar við** (t.d. breyð + frukt). Tá liðini hava spælt, hevur skúlin bílagt tvey pitsastykkir til hvønn næming.

Minnist eisini til at hava drekkidunk við. Loyvt er at hava lummapening við, men í mesta lagi 150,- kr.

At minnast:

Minnist til ítróttarklæði, drekkidunk, fótbóltsskógvar (gaggir) og skinnarar, ið er eitt krav frá fyriskiparunum.

Næmingarnir í 5., 6., 7. og 8. fl. kunnu taka svimjiklæðir + handklæði við, tí møguleiki er hjá teimum at fara í Páls Høll, áðrenn vit fara heimaftur. Tað kostar 30,- kr. at svimja, og tað mugu næmingarnir sjálvir gjalda.

Vit fara at brúka tær vøkru litaðu SvL-troyggjurnar, ið næmingarnir fingu til felagsskúlamyndini síðsta summar, so vinarliga takið tær við. Um onkur ikki eigur troyggjuna longur, mugu tit skaffa hana frá onkrum øðrum, sum ikki fer við.

Eru ivamál ella spurningar, so kunnu tit altíð senda teldupost ella eitt sms til roi.jacobsen@skulin.fo ella hogni.joensen@skulin.fo Til ber eisini at senda eitt sms til Róa á tlf. 280313 ella til Høgna á 214109.

Skráin fyri dagin sær annars soleiðis út:

Kl. 08.45	Fráferð av Havnini við Smyrli
Kl. 11.00	Koma til Vágs
Kl. 11.30	Koma í Marghøllina
Kl. 11.45	Innmarsjur við tónleiki
	Finaluliðini marsjera við bannarum sínum inn í Marghøllina, har liðini stilla seg í aldursrød at lýða á vælkomurøðuna til finaludagin í Skúlafótbólti 2018/2019
Kl. 12.30	Finaludagurin byrjar - 40 dystir skulu spælast
Kl. 13.00	Páls Høll letur upp
Kl. 16.00	Steypa- og medaljuhandan
Kl. 17.00	Farið verður frá Marghøllini umborð á Smyril
Kl. 18.15	Siglir Smyril úr Vági til Havnar

Matur og drykkivørur, kaffi og kakur og annað fæst til keyps í Marghøllini.

Vit gleða okkum til ein góðan, hugnaligan og spennandi finaludag í Marghøllini.

Blíðar heilsanir

Høgni og Rói

Skúlin við Løgmannabreyt